# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Merkið á stong um eina viku



*Í hesum døgum er Heidi á venjingarlegu í Thailandi, har seinasta fínpussingin undan OL-luttøkuni skal greiðast*

**Næst seinasta mánadag fór Heidi Andreasen saman við venjara sínum, Kristian Martini Joensen, til Thailands á venjingarlegu, áðrenn leiðin gongur til Beijing**

OL
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

6. september verða Paralympisku leikirnir settir og tá verður Merkið vundið á stong saman við 144 øðrum fløggum.

Heidi Andreasen umboðar Føroyar á leikunum. Hon skal svimja 50, 100 og 400 m frísvimjing og 200 m blandað. Hetta er triðja ferðin, at Heidi er við á leikunum, og tær báðar undanfarnu ferðirnar hava úrslitini verið framúr.

Mánadagin fóru Heidi og Kristian Martin til Thailands saman við svenska landsliðnum, sum Heidi eisini hevur verið á venjingarlegu við áður.. Har fáa svimjararnir vant seg vid tíðarmunin og veðrið. Og sjálvsagt fara tey at venja í 50 metra hyli. Síðani fara tey beinleiðis til Beijing.

Í svimjihøllini er pláss fyri 17.000 áskodarum, og helst verður fullsett, tí áhugin fyri svimjingini er ómetaliga stórur, verður sagt.



*B36 hevur tvær ferðir vunnið á Víkingi í ár. Tá varð tó spælt í Gundadali, og í Sarpugerði vilja víkingarnir hava uppreisn*

Víkingur-B36:

# Brak í Sarpugerði

**Víkingarnir eru fullmannaðir, tá teir skulu aftur á beint. Hjá B36 er talan framvegis um manfall**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Seinastu vikurnar hevur verið líkt til, at dysturin um silvurmerkini í Formuladeildini skuldi standa millum B36 og Víking.

Bæði tvey taptu tó í miðvikuni, og tí ræður um at fáa fulla úrtøku hesaferð, um fokus framvegis skal haldast á silvurinum.

Hjá Víkingi var tapið móti B68 tað fyrsta í átta umførum, og teir siga seg vilja aftur á beint sum skjótast. Og til uppgávuna kann Anton Skoradal stilla við sterkasta liði. Einasti spælarin, sum hevur verið ivasamur, er Sølvi Vatnhamar, sum endaði dystin mikukvøldið haltandi. Men hann royndi at renna aftur í gjárkvøldið, og hetta gjørdi hann uttan trupulleikar, eru boðini úr Sarpugerði.

Hjá B36 hevur mannfallið verið stórt seinastu vikurnar, og tað er lítið batnað undan sunnudegnum. Klæmint Matras hevur framvegis leikbann eftir reyða kortið, sum hann fekk móti Skála, og enn er Súni Olsen ikki førur fyri at spæla.

Hinvegin eru batar at hóma hjá Sam Malson og Inga Højsted. Enski áleyparin kom eisini á vøllin í tapinum í Fuglafirði, meðan Ingi Højsted hevur vant við fullari ferð í vikuni. So tað røkist kanska fyri, at teir báðir tveir eru partur av hópinum, sum fer til Gøtu sunnudagin.

# Bólkur H verður krúttunnan

**UEFA-Cup vinnararnir úr Pætursborg skulu kappast við Real Madrid og Juventus um at koma víðari úr bólki H í Champions League**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Lutakast var til bólkaspælið í Champions League í gjár. Og í Danmark er fagnaðurin stórur, eftir at AaB kom í bólk við meistarunum úr Manchester United. Nakað sum heilt víst merkir fullsett stadion til tann heimadystin. Hartil eru mótstøðuliðni hjá AaB spanska Villarreal og skotska Celtic.

Mest spennandi bólkurin tykist tó vera bólkur H. Ikki bara eru tað tey bæði siðvandu stórfeløgini, Real Madrid og Juventus, sum skulu kappast um at koma víðari. Saman við teimum er eisini russiska Sankta Pætursborg, og tí skulu spanska og italska stórfelagið als ikki kenna seg vís í nøkrum sum helst.

**Bólkarnir í Champions League eru annars hesir:**

**Bólkur A**
Chelsea
AS Roma
Bordeauc
CFR 1907

**Bólkur B**
Inter
Werder Bremen
Panathinaikos
Famagusta

**Bóllkur C**
Barcelona
Sporting Lissabon
Basel
Shakhtar Donetsk

**Bólkur D**
Liverpool
PSV Eindhoven
Marseille
Atletico Madrid

**Bólkur E**
Manchester United
Villarreal
Celtic
AaB

**Bólkur F**
Olympique Lyon
Bayern Munchen
Steaua Bukarest
Fiorentina

**Bólkur G**
Arsenal
Porto
Fenerbache
Dynamo Kiev

**Bólkur H**
Real Madrid
Juventus
Zenit St. Pætursborg
BATE Borislov